# Lívligar kappingar skaptu góðan hýr

**Tær mongu og øðrvísi kappingarnar á Sjómannadegnum í Klaksvík settu dám á dagin. Umframt nógv umtalaðu egningakappingina, vóru eisini fleiri aðrar kappingar á skránni, og menn royndu eisini styrki á ymsan hátt**

SJÓMANNADAGUR

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo



*Teir vóru báðir sera drúgvir í sjómanstakinum, men tað endaði við, at Ísak Petersen av Viðareiði vann finaluna ímóti Andras Sigurðsson úr Klaksvík*

*Myndir: Norðlýsið*

Kappingarnar á Sjómannadegnum í Klaksvík leygardagin settu ein serligan dám á tiltakið. Tað stóð ikki á at fáa luttakarar til tær mongu og øðrvísi kappingarnar, og menn kýttu seg, tá ið teir skuldu royna styrki á ymsan hátt.

Millum kappingarnar varð togtogan millum skipsmanningar, og hetta var kanska tann kappingin, sum eydnaðist best. Hon var lívlig og spennandi, og fyrireikararnir dugdu væl at gera hana forvitnisliga. Endin – altso endin á kappingini – var, at Pison vann frammanfyri Ågot.

Kappast varð eisini í sjómanstaki, og har komu klaksvíkingur Andras Sigurðsson og viðoyingurin Ísak Petersen í finaluna. Her eydnaðist tað tí drúgva viðoyinginum at vinna.

Nógvir luttakarar royndu seg í trolbøtingini, og her eydnaðist tað skiparanum Eyðuni á Bergi at vinna frammanfyri Andor Isaksen og Levi Joensen.

Ein kvinna gjørdi bart í kappingini at rippa. Ása M. Egholm var næstan fýra minuttir frammanfyri nummar 2, og hon var tí í serflokki í júst hesari kappingini.

Fyrireikararnir av Sjómannadegnum heiðraðu eisini teimum bestu bátunum í Norðoyggjum í 2004. Bátarnir vórðu flokkaðir í fimm bólkar, og besti báturin í hvørjum bólki fekk eina virðisløn.

Teir, sum vórðu heiðraðir, vóru Bjørgvin, Bragd, Fagraenni, Gáshøvdi og Klakkur.

## Kvinna í serflokki

Tað vóru eisini aðrar – meira friðarligar kappingar – sum snúðu seg um at vera fittur í hondunum.



*Skiparin Eyðun á Bergi var skjótastur at bøta trolið*



*Teir sterkastu í sjómanstakinum á sigurspallinum. Andras Sigurðsson, Ísak Petersen og Martin Ziska Jacobsen*

### Heimsmeistarakapping í Sjómanstak

| | |
|---|---|
| Nr. 01 | Ísak Petersen |
| Nr. 02 | Andras Sigurðsson |
| Nr. 03 | Martin Ziska Jacobsen |

### Heimsmeistarakapping í Trolbøting

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 01 | Eyðun á Bergi | 7:49 |
| Nr. 02 | Andor Isaksen | 8:10 |
| Nr. 03 | Levi Joensen | 8:19 |
| Nr. 04 | Jóhan Isaksen | 9:26 |
| Nr. 05 | Gilbert Gullaksen | 9:47 |
| Nr. 06 | Palli Sivertsen | 9:53 |
| Nr. 07 | Andras Samson | 10:02 |
| Nr. 08 | Alfred Eliasen | 10:16 |
| Nr. 09 | Ísak Petersen | 11:06 |
| Nr. 10 | Jógvan við Garð | 13:40 |

### Heimsmeistarakapping í Ripping

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 01 | Ása M. Egholm | 7:26 |
| Nr. 02 | Óli Marnar Chr | 11:14 |
| Nr. 03 | Finn Baldvinsson | 12:10 |
| Nr. 04 | Gerda Heinesen | 13:16 |
| Nr. 05 | Klæmint Hansen | 13:09 |
| Nr. 06 | Magni Jacobsen | 13:13 |
| Nr. 07 | Sigrid Mikkelsen | 13:32 |
| Nr. 08 | Regin Jóhannesen | 14:00 |
| Nr. 09 | Høgni Magnusson | 14:16 |
| Nr. 10 | H. Højgaard | 15:22 |

### Bestu bátar og skip

*Uppgerðin er grundað á, hvørjir bátar og hvørji skip í Norðoyggjum hava fiskað mest í tonsum í 2004.*

Útróðrarbátar, smáir: Bjørgvin. 165 tons, 887 kg
Útróðrarbátar: Bragd. 431 tons, 391 kg
Línubátar: Fagraenni. 238 tons, 38 kg
Trolbátar: Gáshøvdi. 553 tons, 983 kg
Línuskip: Klakkur. 1249 tons, 425 kg



*Hesir tríggir fingu heiðursmerki í trolbøtingini: Levi Joensen, Eyðun á Bergi og Andor Isaksen*